# *Yrkisvanlukkur í Føroyum*

Frágreiðing um eina kanning av yrkisvanlukkum í Føroyum í tíðarskeiðinum 1975—1979.

*Høgni Debes Joensen og Pál Weihe*

Endamálið við kanningini er at lýsa yrkisvanlukkur í Føroyum á tann hátt, at sum tilfar verða nýtt øll mál um vanlukkur, ið eru viðgjørd í Føroya Vanlukkutryggingarráði í árunum 1975—79. Tilfarið er allar tær vanlukkur, ið verða fráboðaðar Føroya Vanlukkutrygging. Vanlukkutryggingin í Føroyum fevnir lutvíst um lógbundna vanlukkutrygging, lutvíst sjálvbodnar, frítíðartryggingar, ítróttatryggingar o.a., tilsamans 8 sløg. Lógbundna tryggingin tekur við, tá ið óarbeiðsførið hevur vart 14 dagar, og tekur hon við bæði, tá tað snýr seg um vanlukkutilburðir, ið henda undir arbeiði og áleiðis til ella frá arbeiðsplássi.

Sum støðan er í dag, eru at siga eingi hagtøl viðvíkjandi vanlukkutilburðum í Føroyum.

Vanlukkutilburðirnir í nevnda tíðarskeiði verða í hesi kanning fyri landið sum heild lýstir á tann hátt, at eitt blað (4 foliosíður) verður útfylt eftir teimum upplýsingum, ið eru at finna í málinum hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð fyri hvønn tilburð sær. Til fiskimenn er gjørt eitt blað fyri seg, av tí at hesin yrkisbólkur á so mangan hátt víkur frá arbeiðandi fólkinum á landi.

Tilfarið er fingið til vega á tann hátt, at hvørt einstakt mál er nágreiniliga eftirhugt av omanfyrinevndu læknum, ið síðan hava fylt bløðini út. Hetta arbeiðið var lokið í november 1983.

Alt tilfarið var knappliga 1300 mál. Av hesum snúgva um leið 30 % seg um vanlukkutilburðir hjá fiskimonnum.

Tilfarið er nú sambært avtalu sent til Lærda háskúlan í Bergen, og verður tað nú EDV-viðgjørt har.

Ætlanin er fyrst og fremst at fáa til vega vitan um yrkisvanlukkur í Føroyum viðv. aldri og kyni á teimum, ið vóru fyri vanlukku, yrki teirra nærri lýst, slag av vanlukku, sjúkuavgerð, undir hvørjum umstøðum vanlukkan nágreiniliga hendi o.s.fr.

Hjá fiskimonnum snýr tað seg um 30 ymiskar bólkar av upplýsingum á útfyllingarblaðnum, hjá øllum hinum 26.

Petur Zachariasen, lektari cand.scient. á Støðisútbúgvingini er knýttur at hesum kanningararbeiði sum EDV-kønur, og hevur hann verið í Bergen at kunna seg við EDV-tólini, ið nýtast skulu at viðgera tilfarið við.

Tað veldst um orku og tíð, nær alt kanningarúrslitið er komið á prent, men er ætlanin, at fyrstu úrslitini kunnu prentast á sumri 1984, og at arbeiðið er lokið um 2 ár.

Mett verður, at úrslitið av hesi kanning kann fara at fáa heilt stóran týdning í sambandi við, at farið verður undir økt arbeiði viðv. spurninginum um fyribyrgjandi atgerðir innan føroyskt arbeiðseftirlit í rúmastu merking.

Fróðskaparrit 31. bók (1983): 104.